## Víkingamóttøka í Leirvík

Á móttøku í kvøld fer nýggja felagið, Víkingur, at avdúka búmerkið, sum felagið hevur fingið sær. Víkingur varð stovnað tíðliga í ár, og tað er longu greitt, hvussu nýggi búnin fer at síggja út. Nú skal so avdúkast, hvat búmerki skal prýða ljósabláa búnan, og verður hetta altso víst fram á móttøkuni, sum verður í Bygdarhúsinum í Leirvík. Móttøkan byrjar klokkan 17.



## Tríggir dystir í kvøld

Tríggir hondbóltsdystir í bestu deildunum verða spældir í kvøld. Í Vestmanna skulu kvinnurnar hjá VÍF royna at halda fast í sínari vón um bjarging, tá tær taka ímóti Kyndli. Hjá monnunum spæla H71 og Neistin í Hoyvík, meðan StÍF og KÍF spæla á Skála. Hjá kvinnunum byrjar dysturin í Vestmanna klokkan 18.30. Báðir mansdystirnir byrja klokkan 20.00.

# City-bossur aftur til Thailands



*Thaksin Shinawatra er sera væl lýddur í bláa partinum av Manchester. Hann hevur innan stutta tíð, lyft Manchester City upp úr øskuni. Thaksin fer aftur til Thailands, fyri at reinsa sítt navn, og væntar at málið um fíggjarligan undandrátt fær eina góða viðgerð. Hann sigst hava stuðul í stjórnarflokkinum PPP*

**Manchester Citys eigarin, Thaksin Shinawatra, væntar at blíva handtikin, tá hann kemur heim til Thailands í morgin. Hann er skuldsettur fyri svik**

FÓTBÓLTUR

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Thaksin Shinawatra hevur sambært The Daily Mail, tikið avgerðina, at fara heim aftur til Thailands, fyri á tann hátt at reinsa sítt navn.

### Fíggjarligur undandráttur

Fyrrverandi Thailendski premierministarin er ákærdur fyri fíggjarligan undandrátt í heimlandinum, eftir at hann var premierministari í landinum. Tískil verður væntað, at hann verður handtikin, tá hann er komin úr flogfari sínum.

Thaksin sigur seg vænta at verða handtiknan, men samstundis vónar hann at leiðandi stjórnarflokkurin í landinum (PPP), fer at lata seg royna at reinsa sítt navn.

Sambært Shinawatra, hevur hann á leið 800 milliónir pund, sum hava verið afturhildnar, síðan ákærurnar um fíggjarligan undandrátt í síðsta ár.

### Pengar ávegis til Eriksson

Sambært keldum frá The Daily Mail, er tað meiningin, at Thaksin Shinawatra fer at senda nakrar av teimum mongu milliónunum til Manchester City, hetta merkir sostatt, at venjari felagsins, ið er navnframi Sven Göran Eriksson, kann styrkja um Premier League hópin í flytingarvindeyganum í summar. Hetta kemur ivaleyst væl við, hjá Manchester City viðhaldsfólkunum, ið hava sæð lið sítt lyft seg upp eftir stigatalvuni, síðan Shinawatra kom til felagið fyri einum ári síðan.

### Væntandi vælvild

Ætlanirnar hjá Mnachester City eigaranum fara væntandi at verða viðgjørdar við vælvild, tí tað verður væntað, at PPP skal hava samhuga fyri City-eigaranum, og væntandi vera ákærurnar móti honum skúgvaðar til viks.

# Agger kláraði ein hálvleik

**Daniel Agger var aftur á fótbóltsvøllinum, tá hann spældi ein hálvleik fyri eykaliðið hjá Liverpool, tá hesir spældu móti eykaliðnum hjá Manchester United í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Daniel Agger kann, saman við venjara sínum Rafael Benitez, gleðast yvir at hann umsíðir er klárur til at spæla í minsta lagi 45 minuttir av einum fótbóltsdysti aftur. Tað hevur hann ikki megnað síðan fótskaðan afturi í september. Við hjálp frá serfrøðingum, hevur hann nú fingið ein serliga framleiddan skógv, ið skal hjálpa honum gjøgnum fyrstu vikurnar, meðan føturin enn er viðbrekin*

Tann danski miðverjin var aftur í reyðu troyggjuni, tá hann spældi 45 minuttir í dystinum, frammanfyri 10.000 áskoðarum.

### Úti síðan september

Agger hevur verið úti síðan september, tá hann var so óheppin at bróta eitt bein í fótinum, men hann spældi væl og uttan trupulleikar í 45 minuttir, áðrenn hann varð útskiftur fyri Martin Skrtel.

Agger spældi somikið væl, at Rafael Benitez var sjónliga glaður aftaná. Hann tosaði um hvussu glaður hann var, at hava unga danska verjuleikaran kláran aftur, og um týdningin av at hava allar leikarar 100 % klárar. Benitez kann eisini gleða seg yvir, at hann nú eisini hevur Xabi Alonso og Harry Kewell klárar aftur, og báðir tveir skoraðu eisini fyri Liverpool í hesum dystinum.

### Serligan skógv

Fyrr í ár var annars kunngjørt, at Daniel Agger skuldi fáa comeback, men tað var ein stokkut gleði, tí eftir bert fáum minuttum breyt hann sama fót aftur, og er ikki komin í gongd aftur fyrr enn í gjárkvøldið.

Orsøkin at hann, eins og venjari hansara hava góðar vónir, er at Agger nú hevur ein serliga framleiddan skógv, ið onkursvegna verjir viðbrekna fót hansara.

### Neville eisini klárur

Manchester United høvdu eisini ein verjuleikara, ið royndi seg fyri fyrstu ferð í langa tíð. Talan er um Gary Neville, ið fekk ein tíma av spælitíð í 2-0 ósigrinum móti eykaliðnum hjá Liverpool.

## Steypakapping í styrkilyfti

**8. mars verður steypakapping í styrkislyfti í Yndi Fitness í Havn**

Í vetur vóru hølini karmur um fyrstu FM-kappingini í styrkilyfti í fleiri ár, og tá vóru boðini, at talan nú skuldi verða um meira regluligar kappingar. Steypakappingin annan leygardag verður skipað eftir altjóða reglunum, og síggjast hesar millum annað á heimasíðuni, www.yndi.fo. Kappingin verður skipað fyri bæði kvinnur og menn, og verða fyrstu tøkini tikin klokkan 16. **np**